## DAGSINS MEINING

# HM kappingin …

So fór henda fyrsta HM vikan í fótbólti aftur um bak. Tað er altíð nakað forkunnugt við tí at fylgja endaspæli í HM-fótbólti. Hóast Føroyar ikki eru við kenna mong av okkum seg kortini tætt knýtt at onkrari av fótbóltstjóðunum, sum luttaka.

Hvussu hevur so gingið  hesa fyrstu vikuna! Enn er ov tíðliga at gera tær heilt neyvu metingarnar, tí fyrsta umfarið er ikki liðugt. Men sum væntað eru tað tær frægu fótbóltstjóðirnar, ið hava vunnið, tó við undantøkum. Hóast sigrarnir ikki hava verið so sannførandi, so hava lond sum Ongland, Týskaland, Argentina, Brasilia, Háland og Italia vunnið sínar dystir. Ójavnt hevur tó verið, hvussu hvør hevur ”leverað vøruna”. T.d. hava Ongland og Brasilia,  verið vónbrot fyri teir fjepparar, sum hálova og tilbiðja hesi lond.

Bert eitt norðurland er við. Svøríki hevur framum mong onnur lond fingið ein stóra uppgávu, nevniliga at tryggja, at  Norðurlond eisini verða umboðað í øðrum umfari. Hóast eina óvantaða byrjan tóku sviar dyk á seg hóskvøldið, tá teir í seinasta minuttinum, fingu sigursgevandi málið móti Paraguay og fingu harvið annað beinið væl inn um gáttina til annað umfar. Flestu av okkum norðbúgvum seta nú okkara álit á, at svenska liðið kemur víðari.

Men Italia, Ongland, Brasilia og Frakland eiga eisini mong viðhaldsfólk millum føroyingar, so tað er kanska so sum so við tí norðurlendska, tá avtornar. Tó so at fáa sviar sítt góða spæl at koyra og málkanónirnar innstillaðar rætt, so man lív koma í okkara norrønu røtur. Hvør norðbúgvi man ikki innast inni í hjartanum ynskja, at ein av okkara spældi seg til finaluna og kanska entá til HM-heitið!

At afrikonsku tjóðirnar hava sett seg á fótbóltslandakortið er at fegnast um. HM fótbóltur hevur nógv meira at týða enn tað at vinna. Tað at vera við, vísa rætta stríðsandan og sonn fótbóltskynstur og so vónandi eisini fáa góð úrslit er góð marknaðarføring av eini tjóð og tess fólki. Hetta kenna vit føroyingar til.  Fótbólturin savnar eisini og kann hava týdning fyri menningina av fólkaræðinum. Spurningurin er so eisini, um ikki hetta nærum ”forgudaða” spæl ikki eisini hevur eina jaliga ávirkan á okkum øll, tá hugsað verður um tað stress, sum er vorðið stórur partur av okkara gerandisdegi. Har tað eisini hevur týdning at kunna ”kobla” frá.

Hugaligt verður at fylgja HM kappingini, tó at vón okkara skal vera, at frægu fótbóltstjóðirnar finna rætta stevið aftur.  Higartil hava ikki verið so nógvar perlur á vøllunum í Týskalandi, men orsøkin kann eisini vera tann, at krútið verður ikki tikið fram av álvara fyrr enn í komandi umførunum, tá tann eini dysturin snýr seg  um ”lív og deyð”.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin verjir borg einsamallur



JASPUR VANG
Tvøroyri

**Í og við at gerandisdagur og framtíðar vælferð føroyinga hevur størri týdning enn fullveldismøsni, eigur ríkisveitingin at verða dagførd og ágóðin m. a. at koma okkara pensionistum, sjúkrahúsverkinum og skúlaverkinum til góðar**

Øll vistu vit, at fullveldisflokkarnir í andstøðu og Fólkaflokkurin raðfesta fullveldi framm um væl-ferðina hjá vanliga føroyinginum. Men at Javnaðarflokkurin, sum fyri bert 4 – 5 árum síðani ikki duldi fyri, at eisini hann reið á fullveldisbylgjuni og tá segði seg vera til reiðar at skerja ríkisveitingina við 106 mió. kr., framvegis velur fullveldi fram um vælferð føroyinga og ikki tykist vera sinnaður at dagføra ríkisveitingina, var ikki væntandi.

**Fólkafloksfjepparar og landskassablokkur**

Sá í bløðunum ein av døgunum, at onkur fólkafloksfjeppari úr Havn óttast, at hækkandi ríkisveiting av Sambandsflokkinum fer at verða nýtt til til at betra um korini hjá teimum, hann kallar tey veiku í samfelagnum, umframt til íløgur í vegir og tunlar úti um landi. Hugsaði við mær sjálvum, um slíkur fjeppari mann gera sær nakrar tankar um, hvussu nógv tons av fiski skulu flytast eftir vegum, gjøgnum tunlar og við ferjum um firðir og sund kring landið, fyri at rinda bert eina einastu almenna akademiska løn, harav langt tær flestu verða útgoldnar í Havn. Loyvi mær annars stórliga at ivast í, hvussu sjálvbjargin stórur partur av landinum hevði verið uttan landskassablokk og ríkisveitingina. Mangur fólkafloksfjeppari hevði tá uttan iva leitað sær starv í sunnara partinum av ríkinum, har teir eisini fingu sína útbúgving. Havi tí ógvuliga ilt við at fata, at fólkafloksfjeppari úr Havn kann fá seg til at misunna økjunum úti um landi neyðugar vegir og tunlar og føroyskum pensionistum mannsømilig kor.

Hvat teimum sokallaðu veiku í samfelagnum viðvíkur er at siga, at hesi eru tey sterku, sum løgdu lunnar undir – og í ríkisfelagsskapi bygdu hettar samfelagið, men nú eru komin í eftirlønaraldur og tørva eina væl uppiborna eftirløn og í øðrum førum eru teir stinnu, sum í ov ungum árum eitt nú á skipsdekki slitu seg upp og tískil tørva eina somuleiðis væl uppiborna veiting frá almennu Føroyum.

**Almennu pensiónirnar**

Kanning, sum fyri ikki so langari tíð síðani varð almannakunngjørd í føroysku bløðunum vísti, at almennu pensiónirnar í Føroyum eru millum 20 – 40% lægri enn tilsvarandi donsku pensiónirnar. Við øðrum orðum er vælferðin her á klettunum í so máta munandi lægri enn í sunnara partinum av ríkinum. Harumframt skulu vit geva gætur, at m. a. oljuprísirnir eru munandi hækkaðir, umframt at føroyskir pensionistar, í mun til eitt nú danskar pensionistar, sum fyri ein stóran part búgva í íbúðum, hava stórar útreiðslur av viðlíkahaldi av egnum bústaði v.m.

**Skúlaverkið**

Tað er einki dulsmál, at neyðugar játtanir ikki hava fylgt teimum lógarkravdu broytingum, sum eru álagdar skúlunum og lærarunum seinastu árini, eins og tann í seinastuni nógv umrødda PISA-kanningin sjálvsagt hevur verið orsøk til mikla sjálvrannsakan og vónandi eisini fer at hava við sær, at orð verða til gerð heldur enn burturforkláringar. Tað sigur seg sjálvt, at á hesum øki verður tørvur á íløgum í arbeiðsmegina og undirvísingartilfarið.

**Ríkisveitingin**

Uppáhaldið, at ríkisveitingin er skaðilig fyri føroyska búskapin, er bert kávalótir. Sjálvsagt er peningur í sjálvum sær ikki er skaðiligur. Hinvegin er tað politikararnir, sum nýta peningin skeivt, ið eru skaðiligir. Serstakliga teir politikarar, sum fyri bert 4 árum síðani skerdu ríkisveitingina. Henda dáragerð hevur við komandi ársskifti kostað føroyingum uml. 2 milliardir krónur, umframt at hesir politkarar hækkaðu árligu rakstrarútreiðslur landskassans við uml. 1 milliard krónum – alt uttan at skapa vøkstur og framburð.

**Sjálvberandi búskapur**

Sjálvsagt skulu vit arbeiða fram ímóti einum sjálvberandi búskapi – hvør vil ikki tað. Tó ber ikki til bert at lækka ríkisveitingina, uttan at skapa meirinntøkur og vøkstur. Fyri tað, at landsbúskaparligu útlitini í løtuni eru toluliga góð, bert 2 ár eftir at fullveldisskútan kollsigldi og manningin slapp sær undan búskaparliga upptakinum, skulu vit gera okkum púra greitt, at alla tað tíð fiskivinnan er okkara altavgerðandi høvuðsvinna, er føroyski búskapurin sárbarur og stendur og fellur við skiftandi fiskaprísum, oljuprísunum og tí tilfeingi okkara sjófólk dregur til lands. Tí er tað ábyrgdarleyst, um vit til komandi samráðingarnar við donsku stjórnina ikki leggja upp til dagføringar av ríkisveitingini og á hendan hátt fáa part í tí hækkandi vælferð, restin av ríkinum er fyri og sum vit eiga sjálvsagdan rætt til.

**Samandráttur**

Í mínum hugaheimi er tað ein niðurgerð av teimum føroyingum, sum tørva pensiónirnar, sjúkrahús-viðgerðina v.m., um vit ikki gagnnýta fyrimunirnar í ríkisfelagsskapinum, sum vit eru og verða partur av í mong ár frammyvir. Tað er og verður teir veikaru samfelagsbólkarnir og tey politiskt veikaru økini í landinum, sum verða fyri vanbýti, tá tað aftur sansar at í landskassanum. Vónandi síggja hinir flokkarnir eisini veruleikan í eyguni, gloyma fullveldismøsni eina løtu og verja borg saman við Sambandsflokkinum, heldur enn at avreiða vælferðina hjá vanliga føroyinginum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar. Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo

e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.